# VIDTØKUR

# FYRI

# SANDAVÁGS BYGDASAVN

## *Navn , heimstadur og endamál*

**1.**

Navn savnsins er Sandavágs Bygdasavn. Heimstadur savnsins er Sandavágur.

**2.**

Sandavágs Bygdasavn er sjálvognarstovnur, settur á stovn av Sandavágs Fornminnafelag og Sandavágs bygdarád. Endamál savnsins er, vid serligum atlitid at Sandavágs bygd, søgu og fólki:

a) at savna, skráseta og vardveita alt slag av søguligum tilfari, so sum fornminnisligar lutir og lutir frá nýggjari tíd, skjøl, myndir, listaverk, band- og sjónbandaupptøkur o.s.fr., sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan til ymsar tídir ella eru knýttar til søguligar hendingar.

b) at virka sum upplýsingarstovnur vid at skipa fyri framsýningum, fyrilestrum og líknandi tiltøkum á øllum vidkomandi økjum.

c) at vardveita og umsita føst fornminni, m.a. "Løgmanngardin".

d) í øllum virki savnsins, at vekja ans fyri fornminnum, bygningum, umhvørvum og forngripum av antikvariskum, sidsøguligum og estetiskum virdi og beinleidis arbeida fyri varveiting av slíkum.

## *Leidsla*

**3.**

Felagid verdur stjórna av eini 5-manna nevnd, har 3 limir verda valdir av nevndini í Sandavágs Fornminnafelag og 2 limir valdir av Sandavágs bygdarád. Stýrid skipar seg vid formanni, næstformanni og kassameistara, um ongin savnsleidari er settur. Formadurin kallar inn til og stjórnar nevndarfundum. Formadur savnsins skrivar í gerdabók frágreiding um mál id eru til vidgerdar og samtyktir á nevndarfundum og annars um virkid felagsins. Gerdarbókin skal undirskrivast av hjástøddu nevndarlimunum.

**4.**

Nevndin stendur adalfundi Sandavágs Fornminnafelags og Sandavágs bygdarád til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

**5.**

Um 2 nevndarlimir krevja tad, skal formadurin kalla inn til nevndarfund.

**6.**

Hvør nevndarlimur hevur eina atkvødu. Nevndin er vidtøkufør tá 3 limir eru á fundi. Atkvødugreidsla verdur avgjørd vid vanligum meiriluta millum møttu nevndarlimirnar. Standa atkvødur á jøvnum, er málid burturdottid á hesum fundi.

**7.**

Nevndin kann seta savnsleidara, sum vid hjálp og leidbeining frá landsantikvarinum og undir eftirliti hansara tekur sær av dagligu vidurskiftum felagsins.

**8.**

Til vedsetan av fastari ogn savnsins krevst stýrissamtykt og undirskrift frá formanni og 2 nevndarlimum. Savnslutir kunnu ikki vedsetast, gevast, seljast ella á annan hátt takast úr savninum.

## *Roknskapur og grannskodan.*

**9.**

Roknskaparárid er frá 1.januar til 31.desembur. Fyrsta roknskaparárid gongur frá stovningardegnum til 31.desembur [redacted]. 2004.

**10.**

Savnsleidari ella kassameistari nevndarrinnar heldur roknskapin soleidis, at tad altíd ber til at síggja, hvussu fíggjarstødan er. Roknskapurin skal gerast lidugur í so gódari tíd frammanundan ársadalfundi hjá Sandavágs Fornminnafelag, at formadurin kann lata Sandavágs bygdarád, grannskodararnar og nevndarlimirnar fáa roknskapin til kanningar.

**11.**

Grannskodadur roknskapur verdur fyrilagdur á ársadalfundi hjá Sandavágs Fornminnafelag og á fundi hjá Sandavágs bygdarád til gódkenningar, og verdur sendur landsantikvarinum, vid frágreiding og skjølum seinast 2 mánadir eftir adalfundin. Samstundis sendir savnsleidarin ella kassameistarin eina av nevndini gódkenda rakstraraetlan fyri komandi fíggjarár.

## *Avtøka av savninum*

**12.**

Avtøka av savninum krevur samtykt á tveimum lógliga lýstum adalfundum í Sandavágs Fornminnafelag upp í slag. Verdur avgjørt, at gevast vid savninum, verdur farid fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 09.mai 1972 vid seinni broytingum.

----------O----------

Soleidis samtykt á eykaadalfundi Sandavágs Fornminnafelags í Sandavági tann / [redacted]

og á fundi hjá Sandavágs bygdarád í Sandavági tann / [redacted]

Nevndin skipar seg soleidis:

____________________
formadur

____________________
næstformadur

____________________
kassameistari

____________________
nevndarlimur

____________________
nevndarlimur

Sandavágur tann / [redacted]